## Bjálving er loysnin

Ein nýggj frágreiðing, sum Altjóða Orkustovnurin IEA hevur gjørt, men sum ikki er almannakunngjørd enn, kemur til ta niðurstøðu, at tann besti hátturin at skerja CO2-útlátið er at bjálva hús og bygningar munandi betur enn nú. Tí er umráðandi, at vit brúka meiri og betri bjálving, fleiri lágorkuvindeygu og onnur tiltøk, sum kunnu forða fyri, at ov nógvur hiti fer til spillis. Tað skrivar Politiken í dag. Danski granskarin Jens Laustsen tekur undir við sjónarmiðinum hjá IEA. Hann sigur við Politiken, at betri bjálving kann gera so stóran mun, at tað skal takast í størsta álvara.



## Kvinna fyri Kennedy

Alt bendir á, at ein kvinna kemur í amerikanska Senatið fyri demokratiska senatorin Edward Kennedy, sum doyði fyrr í ár. Í gjár var undanval í statinum Massachusetts, sum Edward Kennedy umboðaði, og har fekk demokratiska valevnið Martha Coakley flestar atkvøður. Tað avgerandi valumfarið verður í januar, men eygleiðarar siga, at tað er lítil og eingin ivi um, at Martha Coakley fer at vinna á republikanska avbjóðaranum tá. Hon fær tó als ikki ta støðu í Senatinum, sum Edward Kenndey hevði, skrivar AP.

# Smaragd og Safir landað í Klaksvík

**Hesa vikuna hava nøkur skip landað í Klaksvík, og á landingarmiðstøðini hava tey soleiðis landað trol-, línu-og snellufisk**

**FISKIVINNA**
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*




Mánadagin landaðu partrolararnir Smaragd og Safir í Klaksvík. Teir høvdu 120.000 pund av upsa.

Trolbáturin Varðin og snelluskipið Havsbrún landaðu eisini í Klaksvík mánadagin. Varðin hevði umleið 10.000 pund og Havsbrún umleið 15.000 pund.

Í dag kemur Ágot av Íslandsrygginum við 30.000 pundum av línufiski. Ein stórur partur av veiðini er toskur, og nakað er eisini av svartkalva.

Á landingarmiðstøðini í Klaksvík siga tey, at snelluskipið Báran hevur boðað frá landing í morgin, og teir hava umleið 12.000 pund av upsa.



*i á virkinum. Saman við maskinfólki og øðrum verður arbeiði til umleið 50 fólk á virkinum*



*- Eg ivist onga løtu í, at hevði føroyska svartkjaftakvotan ikki verið býtt millum feløg og skip, men framhaldandi verið felagskvota, høvdu Føroyar sum samfelag fingið munandi minni burtur úr kvotuni, sigur Hanus Hansen, reiðari. Myndin er tikin niður í lastina á Fagrabergi, sum hevur góð 300 tons av svartkjafti*

sum skipini leggja upp í Kollafirði.

### 11 mans

Manningin á Fagrabergi liggur millum um 11 mans hvønn túrin. Skipari hendan túrin var Øssur Hentze, sum er ættaður av Kambsdali, men býr í Fuglafirði.

Skipari við Fagrabergi er annars Høgni Hansen, sum býr í Oyndarfirði.

Hann var eisini umborð á skipinum í morgum, tá myndamaður okkara var fram við og tók nakrar myndir av hesi fyrstu lastini, sum nú verður løgd upp til nýggja felagið, ið fer at reka pelagiska virkið í Kollafirði.




SOUSCHEFUR TIL NORRÖNU

Søkt verður eftir souschefi til galluna umborð á Norrönu at byrja 1. februar 2010.

Smyril Line bjóðar áhugavert og avbjóðandi arbeiði sum souschefur í einum altjóða umhvørvi.

Vit vænta, at tú:
- ert kreativur, lagaligur og hevur ábyrgdarkenslu
- hevur hug og evni at arbeiða saman við øðrum
- kanst arbeiða sjálvstøðugt
- ert fleksibul og hevur gott sinnalag
- ert útlærdru gastronomiskur kokkur

Vit bjóða:
- eitt spennandi og krevjandi starv á einum stórum og fjølbroyttum arbeiðsplássi
- góðar umstøður og gott arbeiðsumhvørvið
- góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning
- arbeið og frítíð í lutfallinum 1 til 1

Setanarviðurskifti
Starvið verður lønt í samráð við Chef Manager.

Starvið verður sett skjótast gjørligt, men vit bíða fegin eftir tí rætta.

Umsóknir og CV skulu sendast við telduposti til hesa tilskrift innan mánadag 30. desember:

chef.manager@norrona.fo
Tel. 344850 / 344835

Smyril Line varð stovnað í 1982, og er í dag ein altjóða fyritøka við skrivstovum í Føroyum, Íslandi, Týsklandi og Danmark. Umframt egnar skrivstovur, hevur felagið eisini aðalsøluumboð í Bretlandi, Beligu, Fraklandi, Hollandi, Italiu, Pólandi og Svøríki. Smyril Line hevur eisini tætt samstarv við samstarvsfelagar í meginpartinum av evropeiska meginlandinum og restini av útheiminum.

SMYRIL LINE · YVIRI VIÐ STROND 1 · POSTBOKS 370 · FO-110 TÓRSHAVN
TLF 34 59 00 · FAX 34 59 50 · OFFICE@SMYRIL-LINE.FO · WWW.SMYRIL-LINE.FO